## UTTAN ÚR HEIMI



*Amerikansku krígsfangarnir, sum vórðu vístir fram í irakska sjónvarpinum, vóru týðiliga bangnir*

Mynd: Reuters

# Krígsins andlit

**Myndir av bangnum og skelvandi amerikanskum krígsfangum hava verið á sjónvarpsskíggjum um allan heim - uttan í USA**

KRÍGGJ Í IRAK
*Árni Joensen*

George W. Bush, forseti og Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri vóru sjónliga í øðini um, at almenna irakska sjónvarpið og arabiska sjónvarpsstøðin al-Jazeera høvdu víst øllum heiminum myndir av ræðusluslignum amerikanskum krígsfangum í Irak. Umframt myndirnar av fangunum vóru myndir av deyðum amerikanskum hermonnum.

Amerikanarar sjálvir fingu ikki myndirnar at síggja, ti í krígstíð eru amerikansku sjónvarpsstøðirnar ein partur av krígstilbúgvingini. Men amerikanarar frættu kortini um myndirnar. Bretsku sjónvarpsstøðirnar BBC og Sky News valdu báðar at vísa myndirnar av amerikansku krígsfangunum.

Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri gjørdi sunnudagin greitt, at framferðin hjá iraksku myndugleikunum er í stríð við Genevesáttmálan um krígsførslu, tí sambært honum er tað ikki loyvt at taka myndir av krígsfangum ella at avhoyra teir alment. Hesar báðar reglurnar, brutu irakar, segði hann. Fleiri fjølmiðlar svaraðu aftur við at vísa á, at amerikanska stjórnin hevði ongar viðmerkingar, tá amerikanskar og aðrar sjónvarpsstøðir vístu myndir av tiknum irakskum hermonnum.

George W. Bush, forseti sigur seg vænta, at amerikanskir fangarnir í Irak fáa ta viðferð, sum teir eiga at fáa sambært galdandi sáttmálum, og hann hótti við at revsa teir seku, røra irakar so mikið sum eitt hár á høvdinum á amerikanskum hermonnunum.

Útlendskir eygleiðarar í USA siga, at fleiri myndir av hesum slagnum kunnu skjótt fáa amerikanarar at venda sær ímóti krígnum í Irak og forsetanum. Sum er taka 70 prosent av amerikanarunum undir við forsetanum og krígnum, men hetta talið kann minka skjótt, koma fleiri myndir av tiknum ella deyðum amerikanskum hermonnum á skíggjan. Tað sama er galdandi fyri Tony Blair í Bretlandi, siga eygleiðarar í London.

Tað er ikki heilt greitt, hvussu nógvir amerikanskir og bretskir hermenn eru falnir ella tiknir til fanga. Í gjár søgdu tær almennu upplýsingarnar, at amerikanararnir høvdu mist 14 hermenn og bretar 16.

Teir fimm amerikansku hermenninir, teirra millum ein kvinna, og teir sjey deyðu, sum vórðu vístir á skíggjanum hjá al-Jazzera, vóru úr einari herdeild, sum vanliga hevur støð í Texas.

## Hóttir mannaættina

Jóhannes Páll pávi Annar heldur, at kríggið ímóti Irak er ein hóttan ímóti lagnu mannaættarinnar.

Tað segði hann við italskar tíðindamenn sunnudagin. Pávin segði, at tá eitt kríggj sum tað í Irak hóttir mannaættina, er tað umráðandi at gera vart við, at friður er leiðin fram ímóti einum sameindum og rættvísum heimssamfelag.

Jóhannes Páll pávi Annar er millum teir harðastu mótstøðumenninar ímóti krígnum í Irak, og hann hevur sent sínar næstu menn til Washington og London at royna at loysa Irak-kreppuna við samráðingum. Orð pávans sunnudagin vóru hansara fyrstu, síðani kríggið við Irak byrjaði.

## Tíðindamaður deyður

Ein av teimum mest royndu bretsku krígstíðindamonnunum, Terry Lloyd, er deyður í krígnum í Irak.

Terry lloyd var saman við einari bretskari herdeild har suðuri í Irak, og leygardagin boðaði leiðslan hjá deildini frá, at tíðindamaðurin var horvin. Tað ljóðaði, at irakskir hermenn høvdu skotið eftir Terry Lloyd og tveimum øðrum tíðindamonnum, men sambært amerikanska sjónvarpinum CNN vóru tað bretskir ella amerikanskir hermenn, sum av misgáum skutu bretska tíðindamannin. Seinni upplýsti bretska herleiðslan, at líkið av Terry Lloyd varð funnið á einum sjúkrahúsi í býnum Basra. Hinir báðir tíðindamenninir, sum vóru saman við honum, eru ikki funnir aftur.

Terry Lloyd arbeiddi hjá bretsku sjónvarpsstøðini ITN. Hann var krígstíðindamaður og var fastur fúsur á hermótinum, tá kríggj brast á.

## Hann er á lívi

Fyri nøkrum døgum síðani boðaði amerikanska fregnartænastan CIA frá, at irakski generalurin Ali Hassan al-Majid var deyður, men sunnudagin kunngjørdi amerikanska herleiðslan, at hann er framvegis á lívi.

Ali Hassan al-Majid gongur eisini undir navninum Gass-Ali, tí tað var hann, sum stóð á odda fyri teimum iraksku herdeildunum, sum myrdu túsundtals kurdar við gassi í 1988. Hann gav eisini boð um at handtaka nógvar kurdar, og flestu teirra komu ongantíð afturíaftur. Sunnudagin frættist, at Ali Hassan al-Majid var sæddur í irakska býnum An Nasiriyah, har hann og menn hansara høvdu fingið sær høvuðsstøð á einum sjúkrahúsi.

Ali Hassan al-Majid er systkinabarn Saddam Hussein, og hann hevur leingi verið ein av næstu medarbeiðarunum hjá irakska forsetanum. Tá Irak hersetti Kuwait í august í 1990, varð generalurin tilnevndur hernaðarguvernørur í Kuwait. Generalurin stendur ovarlaga á listanum við irakskum leiðarum, sum amerikanarar fegnir vilja hava fatur á.

## Ja til nýggja grundlóg

Meiri enn 90 prosent av veljarunum í Kekenia tóku á fólkaatkvøðu sunnudagin undir við einari nýggjari grundlóg, sum skal fáa enda á tí blóðuga krígnum, sum nú hevur vart í hálvtfjórða ár.

Kekensku valmyndugleikarnir kunngjørdu gjáramorgunin, at 95,5 prosent av veljarunum høvdu atkvøtt fyri teirri nýggju grundlógini, meðan 4,1 prosent høvdu atkvøtt ímóti. Meiri enn 80 prosent av veljarunum vóru og atkvøddu.

Umleið 540.000 høvdu atkvøðurætt á fólkaatkvøðuni, sum varð fyriskipað undir sera strongum trygdartiltøkum orsakað av vandanum fyri møguligum yvirgangsatsóknum frá viðgongdum bólkum.

# Vandi fyri vanlukku í Basra

**Næststørsti býurin í Irak, Basra, er kringsettur, og um fáar dagar verða fólk har noydd at frekka vatnið úr kloakkunum, sigur Reyði Krossur**

KRÍGGJ Í IRAK
*Árni Joensen*

Bretskir hermenn hava kringsett Basra, sum er næststørsti býurin í Irak. Har búgva umleið tríggjar milliónir fólk.

Reyði Krossur sigur, at altjóða hjálparfelagsskapir sleppa ikki inn í býin orsakað av kringsetingini, og felagsskapirnir bera ótta fyri, at hetta kann enda sum ein sonn vanlukka, kemur ikki broyting í.

Undir álopinum á býin fóru bæði el- og vatnveitingin, men tað eydnaðist verkfrøðingum hjá Reyða Krossi, sum eru í Basra, at umvæla vatnveitingina, men kortini hava 60 prosent av fólkinum einki reint vatn. Ein talsmaður hjá Reyða Krossi segði í gjár, at um fáar dagar verða fólk í býnum noydd at drekka vatnið úr kloakkunum.

Talsmenn hjá Reyða Krossi siga, at amerikanarar og bretar tykjast ikki hava nóg góðan kunnleika til, hvussu viðurskiftini eru í Irak. Teir siga, at tað ber ikki til at samanbera býir í Irak við býir í Afghanistan. Har høvdu allir býir egið vatn, men so er ikki í Irak, har vatnið ofta verður leitt langan veg.



# Suðurís styrkt rávørugrundarlag

**Nýggi trolarin hjá hvalbingum, Sjagaklettur, hevði 800 kassar sunnudagin**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Í Hvalba eru tey fegin um, at tey aftur kunnu arbeiða fisk í bygdini.*

Mynd: Áki Bertholds

**Hvalba:** Tað er út við hálvt ár síðan, at flakavirkið, Suðurís í Hvalba, varð royndarkoyrt við nýggju eigarunum. Meginparturin av útbúnaðinum á virkinum er nýggjur, og serliga eftir nýggjár er framleiðslan komin upp at koyra.

Í Hvalba siga tey, at fiskaarbeiði hevur verið rættiliga støðugt meginpartin av hesum árinum. Onkur dagur fer burtur ímillum, men fólk eru sum heild nøgd við tað virksemi, sum verið hevur.

Á Suðurís í Hvalba arbeiða eini 50-60 fólk, tá ið mest er at gera.

Meginparturin av fiskinum, sum arbeiddur verður á virkinum, er upsi, men nakað er eisini av kongafiski og hvítum fiski.

Hvalba er góðkend landingarhavn, og tí kemur meginparturin av fiskinum uppí Hvalba. Men virkið keypir eisini fisk aðrastaðni úr oynni og norðanfjørðs.

Hesin fiskurin kemur í bili.

Í dag eru tríggir trolarar heimahoyrandi í Hvalba, Niels Pauli, Steintór og trolarin, Sjagaklettur, sum er keyptur úr Íslandi og er á sínum fyrsta túri.

Fleiri mans úr økinum eru við Mýlingi og Bresti, og hesi skipini leggja eisini nógvar lastir upp í Hvalba.

- Men alt veldst um prísin, ið vit kunnu lata, tí skipini selja, har mest fæst fyri fiskin, siga tey á virkinum.

Í Hvalba vistu tey at siga, at Sjagaklettur helst kemur inn at landa í vikuni; sunnudagin høvdu teir 800 kassar.

Mánadagin var eingin landing í Hvalba, og minni var at gera á virkinum. Nøkur fólk vóru til arbeiðis, og tey høvdu vónir um, at meira verður at gera, sum vikan líður.



# Stórt fiskaborð í Mentanarhúsinum

**Eftir borðhaldið, sum endar klokkan 23, fara kekkisku, Country Sisters, at spæla til dans**

FISKUR OG DANSUR
*Vilmund Jacobsen*

Leygarkvøldið, 5. apríl, skipar Mentanarhúsið í Fuglafirði fyri stórum fiskaborði, har Birgir Enni fer at borðreiða við alskyns fiskamati.

Fiskaborðið byrjar kl. 19 og endar kl. 23. Kostnaðurin er 195 kr., og plássið er avmarkað. 100 fólk sleppa til borðs. Tekning til fiskaborðið fer fram hjá Samson Nesá á tlf. 218714.

Birgir Enni er ikki ókendur í Føroyum við sínum vælsmakkandi fiskaborði, og tað er ikki sørt, at hann eisini er kendur uttanlands.

### Country Sisters

Eftir borðhaldið, fer kekkiski country-bólkurin, Country Sisters, at spæla til dans.

Atgongumerkini til dansin kosta 175 kr., og pláss er fyri 600 fólkum.

Samson Nesá sigur, at kekkiski bólkurin, sum eisini hevur útgivið fløgur, er kendur og væl umtóktur, eisini í Danmark, har tey eru við á konsertum.

Í Mentanarhúsinum fara kvinnurnar at spæla fýra ferðir 45 min. til dansin hetta kvøldið.

Tað er Mentanarhúsið, sum í samráð við eina kekkiska kvinnu, ið býr á Toftum, hevur fingið Country Sisters til Føroya.

Tær koma higar longu týsdagin, 1. apríl.

### Hotel Føroyar

Friggjakvøldið, 4. apríl, verður døgurði og dansur aftaná við Country Sisters á Hotel Føroyum. Bæði tiltøkini kosta 285 kr. Hotellið hevur lýst við, at til ber at bíleggja eina "pakkaloysn", har tú rindar fyri døgurða, dans og gisting, sum tilsamans kostar 1.150 – fyri tvey.

Men á Hotel Føroyum er longu fult bókað, og útselt er eisini til borðhaldið. Nøkur atgongumerki eru tó eftir til dansin.

# Nógv sild á Skálafjørðinum í vetur

**- Vit fáa 80 oyru fyri kg. av sild, samstundis sum sama sild úr Noregi verður seld til agns í Føroyum fyri 8 kr. fyri kg. Á týsku marknaðunum í eitt nú Bremerhaven og Kuxhaven fer sildin fyri 7-10 kr. fyri kg. Í Føroyum er henda sama sildin næstan virðisleys, sigur maður, sum roynir eftir sild á Skálafjørðinum**

SILD
*Vilmund Jacobsen*

**Skálafjørðurin:** Báðumegin í árskiftið hoyrdu vit um, at nordafarbáturin, Katrin, úr Søldarfirði hevði gjørt nógvar góðar sildadagar á Skálafjørðinum í vetur. Katrin hevur roynt við nót, og bara í tí eini vikuni fyri jól, fingu teir ikki færri enn 100 tons av sild. Men tað eru eisini aðrir, sum royna og hava fingið nógva sild. Ein teirra er nordafarbáturin, Bakkafossur hjá Rólanti Jacobsen, sum eisini er ein gomul "bygdamynd" á Skálafjørðinum og í Sundalagnum.

Teir hava eisini fingið nógva sild, og tá ið vit í síðstu viku skiftu orð við ein av teimum, sum er við bátinum, fingu vit at vita, at teir onkran dagin høvdu fingið uppí eini 14.000-16.000 pund av sild.

So, alt bendir á, at nógv sild hevur staðið á Skálafjørðinum í vetur, og at tað framvegis loysir seg at royna við nót.

Mesta sildin hevur verið at fingið uttarliga á Skálafjørðinum, millum Oyrarnar á Toftum og Málingavirkið á Strondum, men bátarnir hava eisini fingið sild bæði innari og ytri á fjørðinum.

Sildin er misjøvn, nú tað líður út, men hon er yvirhøvur góð. Hendan dagin, vit tosaðu við ein av manningini á Bakkafossi, søgdu teir, at sildin, teir fingu dagin fyri, var rættiliga stór – og feit.

### Onkur toskur

Vit spurdu, um toskur gongur uppí í sildini, men líkt er ikki til, at hetta er nakað at tosa um.

- Av og á er onkur einstakur toskur í nótini, men tað er ikki so vanligt. Ein dagin fingu vit tó eini 100 pund av toski, verður sagt.

At kalla øll sildin, sum bátarnir á Skálafjørðinum fáa, fer til Havsbrún í Fuglafirði. Onkur einstøk nøgd er send av landinum, men Sosialurin hevur ikki frætt nakað ítøkiligt um, hvussu hevur gingist.

Ofta hava menn, sum royna eftir fjarðasild, argast um, at so lítið fæst fyri hana, tí í gamlari tíð var sildin gull verd.

- Eg havi hoyrt um mann, sum undir sum fyrra kríggi tjenti 500 kr. tann eina dagin. Hetta var meira enn ein heil ársløn! Í dag fáa vit 80 oyru fyri kg. av sild, samstundis sum sama sild úr Noregi verður seld til agns í Føroyum fyri 8 kr. fyri kg.

Maðurin, vit hava tosað við, sigur, at á týsku marknaðunum í eitt nú Bremerhaven og Kuxhaven fer sildin fyri 7-10 kr. fyri kg.

- Men í Føroyum er henda sama sildin næstan virðisleys í dag, leggur hann aftrat.

VARPIÐ
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá
TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network
Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel
Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2